# Virkisleiðari/ byggifrøðingur

Sum virkisleiðari fert tú at standa fyri allari framleiðsluni á Føroya Termovirki. Framleiðslan fevnir um termorútar, glas og eisini framleiða vit vindeygu, hurðar og fasadur burturúr alu-profilum av merkinum Schuco International KG. Í hesum sambandi hava vit tætt samstarv við Schuco Danmark.

**Arbeiðsuppgávur:**

- Stýring og samskipan av arbeiðnum í framleiðsluni
- Móttøka og viðgerð av tilboðum og uppfylgjan av hesum
- Aðrar viðkomandi uppgávur í sambandi við framleiðsluna á virkinum

**Førleikar:**
Søkt verður eftir einum persóni, ið hevur royndir innan nevmdu øki ella hevur viðkomandi útbúgving innan byggivinnuna, so sum byggifrøðingur ella líknandi útbúgving.
Tú mást hava góð samstarvsevnir, góð evnir at raðfesta og tilrættisleggja arbeiðið. Somuleiðis skalt tú kunna arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult.

**Vit bjóða:**

- Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv í einum virki, sum er í støðugari menning
- Eina løn, ið samsvarar við tínar dygdir og førleikar umframt aðrar ágóðar

Nærri upplýsingar um starvið fáast, við at venda sær til Eyðfinn Vestergaard, stjóra, á telefon 350 350 ella fartelefon 283763.

**Umsóknir:**
Umsóknir, við viðkomandi prógvum og viðmælum, skulu innan 15. februar 2007, sendast til:

**Føroya Termovirki P/F · Sundsvegur 8 · 100 Tórshavn**

TEAM85

FTV GLAS
FØROYA TERMOVIRKI

---

KRINGVARP FØROYA

# MÓTTØKA

Týsdagin 6. februar verður Kringvarp Føroya 50 ár.

Henda dagin bjóða vit til almenna móttøku í kringvarpshúsinum í Sortudíki frá kl. 15.00 til 17.00.

**Øll eru vælkomin.**

Kringvarp Føroya Norðari Ringvegur
Postboks 1299 FO-110 Tórshavn
Tel.: + 298 34 75 00 Faks: + 298 34 75 01
www.kringvarp.fo

REPROZ

---



SANSIR 355 355

# *LÆRLINGUR*

## *til gávudeildina í Idé Møblum*

Idé møblar sóknast eftir einum evnaríkum og miðvísum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving í okkara spennandi møblahúsi.

**Okkurt um teg**
Vit vænta av tær, at tú hevur FHS og hevur hug at arbeiða við spennandi gávulutum, ið seta dám á føroysku heimini. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti. Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd á Handelsfagskolen í Odder.

**Umsókn**
Send eina stuttorðaða lýsing, merkt lærlingur, til okkara skjótast gjørligt. Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

IDEmøblar
**Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80**

---

ÚTBJÓÐING

## Brúgv um Dalánna

Við hesum verður arbeiðið viðvíkjandi Brúgv um Dalánna á Oyrareingjum við tilhoyrandi vegum, boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um gerð av nýggjari brúgv um Dalánna vestan fyri verandi brúgv. Íroknað arbeiðið, er liðuggerð av íbindingum av verandi vegum og niðurtøka og burturbeining av verandi gomlu brúnni.

Lisitatiónin verður hjá: Landsverki mánadagin 5. mars 2007 kl. 14.00. Ástaðarfundur verður mikudagin 28. februar 2007 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá Landsverki frá mánadegi 5. februar 2007.

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar kr. 2.000,– ið verður at flyta á konto nr. 134.228.4 í Eik Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, tað er 12. mars 2007.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

---

Lesið Sosialin -so eru tit við!